# HEILSANIR



**Til Mariu og Tórstein Madsen, Kvívík**
Elskaðu omma og abbi. Vit ynskja tykkum hjartaliga tillukku við diamantbrúðleypsdegnum 8. des. Túsund takk fyri mangar góðar, stuttligar og hugnaligar løtur saman við tykkum. Jesus signi framtíð tykkara. Muss og klemm
**Signar og Emma**
**PS:** Mamma og babba lata eisini heilsa

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri samkenslu, tá kæri maður, pápi, verfaðir, abbi og bróðir okkara

**Vilhelm Olsen**
Sandavágur

andaðist og varð jarðaður.
Takk fyri allan kærleika á ymiskan hátt. Takk fyri alla ta hjálp, sum veitt varð okkum í samband við jarðarferðina.
Takk fyri góð orð í kirkju, kapelli og heimi, og takk fyri góðan lívgandi sang.
Takk fyri minningarorð, fyri gávur, vitjanir, brøv og telefonuppringingar.
Takk fyri blómur og kransar, og tøkk tit mongu, sum fylgdu Vilhelm til hansara seinasta hvíldarstað á fold.
Gleðilig jól og eitt av Harranum signa nýggjár øll somul, við heilsan frá Lukas 4. 18-19.

*Familjunnar vegna*
**Herborg**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Johanna Kathrina Jacobsen**
vanliga nevnd Lillan
Klaksvík

andaðist og fór til gravar.
Tøkk til Niels Paula Danielsen, prest, og Hans Jacob Joensen, bisp, fyri góð og troystarrík orð í kapellinum og í kirkjuni.
Tøkk til sangarar og kirkjutænarar.
Tøkk til tykkum, sum sendu gávu til Norðoya Røktarheim og til tykkum, sum sendu blómur og kransar.
Tøkk øll tit, sum fylgdu elskaðu mammu okkara til hennara seinasta hvíldarstað.

**Ásla-Malena og Eyðfin**

# Jens Hammer 80 ár

Mikudagin 6. desember fylti Jens Hammer, grótlaðari, í Havn, 80 ár.
Jens er hvalbingur, men hann hevur búð stóran part av lívi sínum í Havn.
Sum ungur var hann sjómaður og arbeiddi eisini í kolanámunum í Hvalba. Hann arbeiddi hjá byggifelagnum E. Pihl & Søn, tá teir gjørdu tunnilin millum Hvalba og Trongisvág. Jens var eisini kendur sum raskastu og djarvastu bjargamonnum.
Jens giftist við Simoniku, f. Zachariassen, ættað av Kirkju í Fugloy. Tey fingu børnini Sigrid og Zacharias. Familjan búði í Hvalba, til tey fluttu til Havnar at búgva umleið 1960.
Simonika fekk starv sum sjúkrrøktari á Landssjúkrahúsinum, og Jens arbeiddi nøkur ár hjá Peturi Michelsen, byggimeistara, til hann fekk starv sum grótlaðari hjá E. Pihl & Søn, sum tá bygdu nýtt sjúkrahús, bæði sjálvan høvuðsbygningin og deildirnar oman fyri vegin.
Seinni byrjaði Jens sum sjálvstøðugur grótlaðari, fyrst saman við Gudmundi Gudmundarson, sum eisini er hvalbingur, og seinni saman við beiggjanum Rólant og abbasoninum Jan. Teir vóru eitt team í nógv ár. Ein annar samstarsfelagi var hundurin hjá Jens, Brio. Hann var altíð við honum til



arbeiðis, og fóru teir eitt ørindi, var hundurin eftir á arbeiðsplássinum og ansaði eftir taskum, matpakkum og amboðum. So løgið tað ljóðar, hjálpti hundurin eisini til við arbeiðinum - á sín hátt.
Jens var við til at laða grót nógvastaðni í býnum, sum t.d. brimgarðin á Molanum, grótlaðingina í og uttanum Norðurlandahúsið, Sjóvinnubankan (nú Føroya Banki) við SMS og við Løgtingshúsið.
Hvalbingarnir eru kendir fyri sínar dygdir sum grótlaðarar í Havn, og nógvir minnisvarðar standa eftir teir í býnum.
Simonika andaðist í 1987, 69 ára gomul, og í 1989 giftist Jens við Lenu Mortensen á Argjum, einkjuni eftir Petur Mortensen. Lena, f. Holm, var ættað úr Skálavík. Tey fingu nøkur ár saman. Lena andaðist í 2000, 88 ára gomul. So Jens er tvær ferðir vorðin einkjumaður.
Jens hevur havt sínu føstu gongd í Ebenezer og seinnu árini í Hebron á Argjum, har hann eisini hevur luttikið við einum orði.
Foreldrini hjá Jens vóru Sigrid, f . Jensen, úr Hørg í Sumba, og Mikkjal Hammer úr Hvalba. Jens eigur 8 abbabørn og 6 langabbabørn.
80 ára føðingardagurin varð hildin í heiminum við Velbastaðvegin hendan dagin saman við familju, vinum og kenningum.

Endurskinsdagurin:

# Tilsamans 33.000 endurskin



**TÍÐINDASKRIV**
*RFF*

Á Endurskinsdegnum 7. des, luttóku um 2.300 næmingar úr 137 flokkum og 43 skúlum kring landið. Tilsamans vórðu savnað um 33.000 endurskin. Í miðal savnaðu næmingarnir 15 endurskin í part.
Sum áður undirstrikað, hevur "Endurskinsdagurin 7. des" eittans endamál, nevniliga at fáa flest møgulig fólk, børn sum gomul, at nýta endurskin og harvið betra um trygdina á vegunum í myrku tíðini.
Kappingin, sum hevur verið fyriskipað í hesum sambandi, hevur minni at týða.
Men hesin formurin at bera evnið fram er valdur fyri at skapa spenning og hann gevur eisini nógvar møguleikar at viðgera evnið, ikki bara í skúlastovuni, men eisini í fjølmiðlunum.
Sjálv uppteljingin av endurskinum hava lærarar staðið fyri og hetta hevur verið gjørt eftir leiðreglum frá RFF, sí viðhefta skjal.
Kunngjørt verður fríggjamorgunin 8. des millum kl 10 og 11, hvør ið verður nr. 1, 2 og 3. Hetta verður gjørt í tíðindaskrivið, sum verður sent til fjølmiðlarnar.
Eftir at næmingarnir hava dragsað øll hesi endurskinini í skúlarnar, so hava teir eina uppgávu eftir, nevniliga at:
BERA ENDURSKINININI HEIM AFTUR OG HANGA TEY UPP Á VETRARKLÆÐINI HJÁ ØLLUM HÚSFÓLKUNUM - OG SOLEIÐIS ELVA TIL AT TEY VERÐA NÝTT.
Á endurskinsdegnum vóru nógvar myndir sendar til RFF og tær verða í næstum lagdar á www.rff.fo.